

Njótið eitt vikuskifti ella eina heila viku í hesum sera áhugaverda býi, sum hevur "alt" at bjóða.



**Sidney Hotel*****
við Victoria

3 nætur fyri hvønn í dupultkamari.
Eykanátt kr. 399,-
Eyka fyri einakamar pr. nátt kr. 200,-

**3.808,-**



**Hotel Americana*****
Baker Street

3 nætur fyri hvønn í dupultkamari.
Eykanátt kr. 351,-
Eyka fyri einakamar pr. nátt kr. 316,-

**3.663,-**



**Hyde Hotel*****
Paddington

3 nætur fyri hvønn í fýramans kamari.
Eykanátt kr. 321,-

**3.572,-**

Íroknað prísin er flogferð, gisting, morgunmatur og øll avgjøld.
Fá nærri at vita á 34 10 10 – ella á www.atlantic.fo

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo


# Nógvar landingar við Kósabrúnna

**Fleiri skip landa í Klaksvík í morgun. Núpur hevur gjørt góðan línutúr undir Íslandi, og Smaragd og Safir hava gjørt góðan upsatúr undir Føroyum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo



*Nógv virksemi er við Kósabrúnna í morgun, og væntandi er, at nøkur skip aftrat koma inn at landa seinni í vikuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í morgun er nógv virksemi framvið allari Kósabrúnni, og nógvir landarar og truckførarar eru til arbeiðis á bryggjuni.

Pól Fuglø á Landingarmiðstøð Føroya sigur, at trý línuskip hava lagt veiðina upp.

Núpur hevur 150.000 pund á 10 setum undir Íslandi, og Klakkur og Grani hava umleið 100.000 pund hvør á 10-12 setum undir Føroyum.

- Meginparturin av veiðini hjá línuskipunum er longa og brosma, og eitt sløð er eisini av toski. Lítið av h‡su er uppi í veiðini, sigur Pól Fuglø.

Veiðan hjá Núpi og Klakki er seld um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya, og sum skilst, hevur miðalprísurin ligið um einar 12-14 krónur fyri kilo.

Kósin hevur keypt veiðina hjá Grana beinleiðis frá skipinum.

Partrolararnir, Smaragd og Safir, landa eisini við Kósabrúnna í morgun, og teir hava eini 230.000 pund tilsamans. Meginparturin av veiðini hjá teimum er upsi, og Pól Fuglø heldur, at upsin hjá skipunum er rímiliga góður.

Vesturfarið, sum fiskar á landleiðini í summar, hevur eini 18.000 pund, meginparturin flatfiskur.

Smaragd og Safir selja veiðina beinleiðis til Kósina, meðan veiðan hjá Vesturfarinum fer um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.

Pól Fuglø væntar, at línuskipini, Jákup B og Polarstjørnan koma inn at landa mikudagin og hósdagin, og væntandi er eisini, at línuskipið, Froya, kemur fríggjadagin.

Aftrat hesum, væntar hann, at línuskipið, Fiskimúli, eisini kemur inn at landa í vikuni.


Northern Marine

MODERN VLCCs

CHIEF OFFICERS • 2ND ENGINEERS
Immediate opportunities exist for Chief Officers and Second Engineers with relevant VLCC experience.

CHIEF ENGINEERS • ETO'S
Ongoing opportunities exist for the above. These opportunities are available due to an expanding fleet and new building programme for our fleet of European manned VLCCs. We provide a competitive package, including a sterling salary. We also offer excellent promotion prospects.

CHEMICAL/PRODUCT TANKERS

ALL SENIOR RANKS
We are expecting delivery of a series of IMO Class 2 Chemical/Product tankers over the next few months and excellent opportunities exist for Officers of all ranks with chemical tanker experience. We offer excellent terms and very good promotion prospects.

To apply, please forward an up to date CV to The Recruitment Manager, Northern Marine Management, Alba House, 2 Central Avenue, Clydebank Business Park, Clydebank G81 2QR.

Email: **nmmrecruitment@stena.com**
Fax: **0141 941 2791**

**www.nmm-stena.com**



STARVSFÓLKALÝSING



**Prentari**

Til prentsmiðju okkara søkja vit eftir einum prentara (trykkjara) at byrja sum skjótast. Trykkjarin skal vera við í einum toymi, ið arbeiðir á báðum 4-lita prentmaskinum okkara.

**Vit vænta, at tú:**
- ert álitandi
- hevur sveinabræv sum trykkjari
- dugir at koyra Heidelberg prentmaskinur við streymniðurføring
- er vanur at prenta ymiskar uppgávur
- tekur ábyrgd av arbeiði tínum
- dugir at samstarva við viðskiftafólk og arbeiðsfelagar tínar

**Tað er ein fyrimunur, um tú:**
- hevur royndir við CPC og CPTronic
- hevur royndir við 4-litaðum og/ella 2-litaðum Heidelberg prentmaskinum

**Bókbindari**

Til bókbindarí okkara søkja vit eftir einum bókbindara at byrja sum skjótast.

**Vit vænta, at tú:**
- ert álitandi
- hevur sveinabræv ella starvsroyndir sum bókbindari
- tekur ábyrgd av arbeiði tínum
- dugir at samstarva við viðskiftafólk og arbeiðsfelagar tínar



**Vit bjóða:**
- eitt avbjóðandi starv í spennandi umhvørvi
- løn eftir royndum

**Umsóknarfreist: 22. juni 2006.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Kára á telefon 59 45 60 ella Jon á telefon 59 45 55.

**Umsókn sendast til:**
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Hoyvíksvegur 59, Postsmoga 3118
110 Tórshavn

Hoyvíksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · Fax 31 80 26 · www.foroyaprent.fo

Føroyaprent